# – Kundi etið fisk hvønn einasta dag



**– Nei, eg líði onga neyð og eg havi heldur ongar trupulleikar av at vera einsamallur her umborð á Orion. Eg havi bæði fartelefon, DVD og nóg mikið av mati. Hvat meir kann eg krevja?!, sigur nógv umrøddi russin á Skála, Bogdan Trendovatskiy**

RUSSARI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Skáli:** - Eg elski fisk og mær hevur altíð dámað sera væl at fiska – serliga nú eg havi fingið stundir til tað her á Skála.

- Her er nokk at fáa, og skal eg siga tær, at eftir bert tveimum tímum havi eg kunnað fingið 2-3 kilo av seiði og skrubbum. Ein dagin fekk eg eisini eina stóra brosmu her inni við skipið. Kom, so skal eg vísa tær hana!, sigur tann 52 ára gamli russiski maskinmeistarin, sum upprunaliga er ættaður úr Murmansk í Norðurrusslandi.

Hann er kvikur yvir til frystiboksina, sum er á

> *»Mister Petterson (altso Sjúrður Gorm) is a good man, slær hann fleiri ferðir fast. - But he has one problem: He is too busy. He works too much«*

tremur við øllum tí matinum, sum hoyrir einum húsarhaldi – og eisini einum skipi – til. Her er so einki tekin til armóð og neyðarstøðu.

Í dag vanta tveir mánaðir og fýra dagar í, til hann hevur verið her í eitt ár. Og líkt er til, at Bogdan Trendovatskiy hevur havt nóg mikið at gera, hevur trivist her – og hevur ikki minst hug at koma aftur hendavegin at arbeiða einaferð seinni.

## Sum ein feria

Hóast Bogdan Trendovatskiy nú arbeiðir í Føroyum, er hann ein maður sum hevur ferðast víða um heimin fyri at útinna handverk sítt, soleiðis at hann kundi breyðføða sær sjálvum, konuni og soni teirra.

- Eg havi faktiskt arbeitt uttanlands síðani 1993, og tað hevur mær dámað sera væl. Tá eg so fekk møguleikan at koma til Føroyar, tók eg sjálvandi av, sigur russin á Skála.

Sum maskinmeistari hevur yrkið ført hann til so ymisk lond sum Egyptaland, Italia og Frakland, og eisini til lond í Miðeystri. Á heysti í fjør skuldi hann fara til eina uppgávu í Grikkalandi, men onkrar forðingar gjørdu, at hetta arbeiðið kortini ikki gjørdist til veruleika. Tí kom hann hendavegin.

Eingin ivi er um, nær hann kom til Føroyar, tí á bryggjuni hevur hann málað við gulari skrift hvaðani hann kom og nær hann kom til Føroyar – Murmansk, 22.11.2007.

Í sínum lívi hevur hann millum annað starvast í maskinrúmum umborð á størri og smærri skipum, eftir at hann fyri 25 árum síðani var liðugur sum meistari.

- At koma higar til Føroyar, tað er sum ein feria fyri meg. Tað er munur á hesum arbeiðinum, sum eg nú havi, og so tí sum eg havi gjørt á teimum stóru høvunum, greiðir hann frá. Og síðani leggur hann álvarsamur aftrat:

- Sonur mín gongur í dag á akademi fyri at gerast skipari. Tað er gott at hann ger tað, tí eg ynski so ikki fyri hann, at sonur mín skal enda í einum maskinrúmi. Hann skal koma at standa til róðurs á eini brúgv!

## Máling og koplingar

Ein hósdag í november mánaði í fjør kom Bogdan Trendovatskiy til Føroyar í tænastu hjá arbeiðsgevara sínum, Sjúrði Gorm Petersen.

Á Skála hevði reiðarin tvey skip liggjandi við bryggju, og tí var neyðugt at hesi skuldu haldast viðlíka hvønn einasta dag, soleiðis at virðini ikki fóru fyri skeyti.

- Mítt arbeiði hevur verið at hyggja eftir káplunum, koplingum, startageneratorin og tryggja mær, at alt í maskinrúminum riggaði til fulnar. Og so havi eg sjálvandi eisini málað rættiliga nógv, greiðir hann frá.

> *»Eg geri tað sama sum so mong onnur – eg arbeiði, eg eti og eg sovi. Hetta er sum eitthvørt annað vanligt arbeiði«*

Í gjár var rættiliga gott veður inni á Skála og tá málaði hann uttandura. Men í dag – hósdag – hevði Bogdan Trendovatskiy hoyrt, at veðrið fór at verða merkt av regni og vindi. So tí varð neyvan nakað av uttandura virksemi í dag.

- Nei, um tað verður regn í morgin, so fari eg at mála umborð á Tróndi. Tað gamla bildekkið treingir so sanniliga til eitt sindur av máling!

## Arbeiði, eti og sovi

Hesa vikuna hevur nógv fokus verið á umstøðunum hjá 52 ára gamla russanum. Men sambært honum hevur hann tað sera gott umborð.

- Ja, eg geri tað sama sum so mong onnur – eg arbeiði, eg eti og eg sovi. Hetta er sum eitthvørt annað vanligt arbeiði, greiðir Bogdan Trendovatskiy frá, og letur upp eitt etui fult av balläðum sigarettum.

Hann fer vanliga á føtur um átta tíðina, fær sær ein bita at eta og ger seg síðani kláran til dagsins uppgávur. Og – sum so mong onnur – fer hann til verka tá klokkan er farin at nærkast níggju.

Tað er nóg mikið at tríva í, tá ein skal ansa eftir tveimum slíkum skipum, so áðrenn Bogdan veruliga veit av tí, er klokkan farin av middegi og urið í messuni vísir 14:00.

Um hetta mundið er



*Nógv er at gera hjá Bogdan Trendovatskiy umborð á Tróndi og Orion, sum liggja við bryggju á Skála. Grøna málingin kom umborð fyrrapartin í gjár, og hann var ikki seinur eftir penslinum at mála tað sum hann skuldi, meðan tað viðraði*